## DAGSINS MEINING

# Hoydal avbyrgir flokkin

Kjaksendingin í útvarpinum í síðstu viku millum Høgna Hoydal og Jóannes Eidesgaard gav nakrar góðar ábendingar um, hvat vit kunnu rokna við í valstríðnum, og hvørjir samgongumøguleikar eru rættiliga nærlagdir eftir valið um 27 dagar.

Eftir orðaskiftinum at døma er Tjóðveldisflokkurin við at avbyrgja seg sjálvan. Tilvitað ella ikki. Hann tvíheldur um eina fullveldistilgongd, sum meiriluti ikki er fyri, og sum Fólkaflokkurin meiri ella minni ikki tekur undir við. Eitt er, hvat floksformaðurin sigur, og eitt annað er, hvat ein meiriluti í flokkinum tekur undir við.

Tjóðveldisflokkurin er spáddur at fáa eitt gott val, men hvat kann hann brúka ein valsigur til, tá samgongan ikki hevur meiriluta eftir valið, og tá hann slettis ikki vil slaka og kanska royna at fáa eina semju við Javnaðarflokkin um eina loysn innan fyri ríkisfelagsskapin. Fyribils í hvussu er, og sum ein dyggur meiriluti er fyri í føroyska veljaraskaranum, heili 59 prosent.

Tí er lítið annað hjá formanninum í Javnaðarflokkinum í at gera enn at siga, at ein samgonga eftir valið má byggja á ein sjálvstýrispolitikk, sum miðjar eftir eini loysn innan karmarnar í ríkisfelagsskapinum.

Hann veit, at her eru samgongumøguleikar við Sambandsflokkin, sum hevur verið rættiliga virkin í trivnaðarmálum, sum Javnaðarflokkurin hevur lagt dent á alla sína tíð. Harafturat veit hann, at tað óivað ber til at finna eina semju við Fólkaflokkin, sum fyri alt vil sleppa at halda fram í samgongu, og sum óivað vil ganga við til eina millumloysn í ríkisrættarliga spurninginum.

Í hesum sambandi er uppskotið hjá Bjarna Djurholm rættiliga áhugavert. Hóast fleiri fólkafloksmenn hava skammað hann fyri at hava borið upp á mál at venda fullveldistilgongdini á høvdið, taka aðrir fólkafloksmenn undir við uppskotinum og rósa tí.

Hann mælir til tað sama sum Javnaðarflokkurin. Nevniliga at samráðast við danir um at seta øll mál á ein lista og yvirtaka tey, tá føroyingar ynskja tað uttan samráðingar við danir í hvørjum einstøkum máli.

Hetta er ein møguleiki, sum er áhugaverdur, men hesir flokkar hava sambært meiningarkanningunum ikki meiriluta í komandi løgtingi.

**Sosialurin**

## VALGREINAR

# Sálarsjúk, nýggjar tíðir!

**Soffi Egholm**
*Valevni Javnaðarfloksins í Norðstreymoy*



Í Føroyum hevur í mong ár verið serlig lóggáva, sum snýr seg um viðurskiftini hjá psykiatriskum sjúklingum. Hon fevnur serliga um viðurskiftini, har innleggjan á sjúkrahús og viðgerð verður givin móti sjúklingans egna vilja. Núverandi lóggáva er frá 1938 og er als ikki tíðarhóskandi longur.

Hetta má broytast!

Broytingar skulu gerðast í nýggjari lóggávu fyri at tryggja rættindini hjá teimum sálarsjúku betri.

Tann grundleggjandi hugburðurin má broytast.

Umráðandi er at lógin tryggjar viðurskiftini hjá sjúklinginum og skapar størri opinleika í viðgerini. Samstundis skal hon seta krøv til tey, sum standa fyri viðgerini og eisini til politiska myndugleikan um at tryggja sømulig og tíðarhóskandi kor.

Tað er uppá tíðina at evnið psykiatri / sálarsjúkur, verður umrøtt og endurskoða á øllum økjum í samfelagnum, bæði politiskt, fakligt og alment, soleiðis at hetta "tabu-evni" verður komið til lívs. Samfelagið á øllum økjum skal betri skilja støðunar hjá hesum sárbæra bólki. Hetta eru fortreytirnar fyri at betra umstøðurnar, og hjálpa teimum sálarsjúku at verða líkastillað í samfelagnum.

Fyri af fáa gongd í hesi viðurskiftir, er millum annað neyðugt við einari nýggjari tíðarhóskandi lóggávu og politiskum vilja.

Hetta er eitt av teimum áhugamálum eg ynski at broyta á tingi.

# Tú fert lætt um sannleikan

**Sverre Midjord**



Í bløðunum nú um dagarnar hevur Kaj Vágfjall eina grein um viðurskiftini her suðuri hjá okkum, og í somu grein verður mín leiklutur umrøddur.

Tá tú gevur teg til at skriva, hvat var betri ógjørt, so skalt tú í øllum føri halda teg til sannleikan, tú skal lata vera við at seta nakran upp ímóti hvørjum øðrum, tí grein tín er skaðilig, tí hon roynir at seta Vág upp ímóti Tvøroyri, hetta er ósakligt.

Tú kanst skriva um tað tú veit, men halda teg til veruleikan. Sum tjóðveldismaður vilt tú siga, at teir hesi fýra árini hava lagt nógv eftir seg og serliga her í Suðuroynni.

Tað, at tað verður bygdur ein nýggjur Smyril, er ikki annað enn rætt og rímuligt og at geva tjóðveldisflokkinum æruna fyri tað er heilt burturvið og tað vita suðuroyingar.

Teir vóru við at gera ætlanina eins og hinir løgtingslimirnir, men fíggingina hana kemur eitt nýtt landsstýri at fremja, tekningar og ætlanir byggja einki skip, tað skulu pengar til.

Ta fergulegu, sum liggur á Drelnesi, hevur Tvøroyrar kommuna goldið, tann sum nú kemur, er ein almenn og verður tað tí tað almenna Føroyar, sum skal fíggja hana, tí skalt tú halda teg til veruleikan, tú sigur eisini at verandi samgonga hevur bygt ein skúla á Tvøroyri; hvar liggur hesin skúli, sum tjóðveldisflokkurin hevur bygt – hann er ikki sjónligur.

Tað var Torbjørn Jacobsen sum landsstýrismaður við stríð og strev legði ein skúla á Tvøroyri. Sambært Torbjørn sjálvan stóð nógv á, tí mótstøðan var stór. Ikki tí at skúlin ikki bleiv lagdur í Tórshavn, men meira tí hann skuldi leggjast á Tvøroyri. Skúlin er komin og tikin í brúk, men Kaj Vágfjall, Tvøroyrar kommuna hevur goldið hvørt oyra av tí hann kostaði, landsstýrið hevur ikki goldið eitt klovið tveyoyra her, sum teir annars gjalda aðrastaðni, har skúlar verða bygdir.

Og tann framhaldandi útbyggingin, sum varð givin til tílsøgn um, hon verður av ongum, tí landsstýrismaðurin Óli Holm, sum avloysti Torbjørn, hevur ikki avsett eitt oyra til skúlabygging á Tvøroyri.

Helst orsakað av plaseringini, tað er munur á monnum.

Og til seinast, tá tú tosar um oljuhavn, so sótu ikki býráðslimir hendur í favn og bíðaðu eftir, at nakað skuldi henda, bæði Páll Vang, sum var býráðsformaður til hann bleiv sjúkur og Dan Nielsen, sum tók yvir, vóru virknir. Men tað, sum jarðlegði ætlan teirra og okkara, var støðan hjá tjóðveldisflokkinum.

Bæði Hergeir og Heini søgdu alment at støða teirra, tjóðveldisfloksins vegna var, at útgerðarhavnin skuldi liggja á Tvøroyri, men sum í fullveldismálinum teir bakkaðu, tað sum tjóðveldisflokkurin leggur eftir seg hetta valskeiðið, eru lyftir og tilsøgnir uttan peningur fylgir við, teir lova, men onnur skulu gjalda.

Viðvíkjandi vinnulívinum á Tvøroyri, so hevur javnaðarflokkurin ikki lagt eina forðing í vegin – men heldur tikið um endan, tá ið á hevur staðið.

Jú mangur fæst við boga.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VALGREINAR

# Eldraøkið er í verandi líki ein landsuppgáva

**Malan Helgadóttir**
*Miðvágur*
*Valevni Javnaðarfloksins*



Eldraøkið eigur ikki at verða lagt út til kommunurnar at umsita í verandi líki. Ístaðin fyri eigur nógv orka frá almennari síðu at verða løgd í at skipa eldraøkið um til eina integreraða, tíðarhóskandi skipan, og fáa ta skipanina at virka í tøttum samstarvi við meginleiðsluna og leiðslurnar úti í teimum seks økjunum, sum Heimarøktin í dag umfatar.

Integrerað eldrarøkt merkir í stuttum, at ellis- og røktarheim, bústovnar av ymiskum slag, dagstovnar, alternativ tilboð og heimarøkt, verður skipað undir einum.

Sitandi samgonga, sum ikki hevur víst orku ella vilja til at útbygt eldraøkið, hevur lagt upp til, at hetta, sum tey ikki kláraðu sjálv, mugu kommurnar nú taka sær av. Hetta er sama samgonga, ið ikki vil yvirtaka flogvøllin frá dønum vegna tess, at hann ikki er tíðarhóskandi!!

Royndarverkætlanin, við integreraðu eldrarøktarskipanini í Sandoynni, verður líðug við árslok. Ein røktartørvskanning er gjørd, og verður niðurstøðan vónandi tøk heilt skjótt.

Tá niðurstøðan av Sandoyarverkætlanina og niðurstøðan av røktartørvskanningini eru tøkar, hava politikkararnir og leiðslurnar verunliga tvey góð amboð at fara til verka við.

Eitt mál í eldrapolitikkinum hjá øllum flokkum er, at tey gomlu kunna vera búgvandi í egnum heimi so leingi tilber, ella so leingi tey ynskja tað.

Hetta mál verður ongantíð rokkið í tí líki, alt eldraøkið er skipað uppá í dag, og við tí manglandi vilja, sum hevur verið at játta nokk pening til eldraøkið.

Hesi seinastu árini eru nógv Eldrasambýlir komin runt alt landið, og skulu kommunur og felagsskapir hava stórt rós fyri tað megnar arbeiði, tey hava gjørt á hesum øki, og hevði støðan hjá mongum gomlum og teirra avvarðandi verið kaotisk, um tey ikki høvdu havt hetta tilboð.

Hóast játtanin til Heimarøktina er hækkað nakað so hvørt hesi heim eru komin, er tað langt frá nóg mikið. Peningur skal til at reka hesi heimini, og hevur hetta tíverri gingið útyvir ta hjálp, Heimarøktin annars kundi veitt teimum heimabúgvandi. Við fullari virðing fyri tí arbeiði, ið verður gjørt á Eldrasambýlum, kann ein løgið nokk siga, at hesi hava havt eina negativa ávirkan á heimabúgvandi, ið tørva hjálp. So her hevur samgongan ikki verið sína uppgávu vaksin.

Javnaðarflokkurin vil leggja nógva orku í, at fáa skipaði viðurskiftir á eldraøkinum, áðrenn tað kann koma uppá tal, at leggja tað ella partar av tí, út til kommunurnar at umsita.

# Ráða føroyingar í Føroyum?

**Elin Tausen**
*Valevni Miðflokksins í Suðurstreymi*



Eg havi hesar seinastu dagarnar lisið, hvat hini valevnini føra fram, og sleppa vit ikki undan, at ríkisrættarligastøðan fær mest umrøðu.

Fólkaflokkurin sigur seg hava sett sjálvstýrið afturum. Saman við slagorðinum "Í Føroyum skulu føroyingar ráða" ljóðar nú eisini "Treysti, trygd og trivni". Fleiri av valevnum floksins skriva um at fólkaflokkurin er tann trygga loysnin til sjálvstýri. Hetta við at verandi yvirtikin so hvørt sum ráð og umstøður eru til tess. Til síðst skal so ein fólkaatkvøða verða, har fólkið skal avgerða um vit skulu taka endaligt sjálvstýri.

Men eitt er tað sum eg hugsi um. Hvat er at velja ímillum í 2012 ? Sjálvstýri og hvat ? Tá øll mál sum kunnu yvirtakast eftir verandi heimastýrislóg eru yvirtikin, og blokkurin er burtur, hvat er tá at velja ímillum? Tað sum flest fólk eru ivasom um, er tað at blokkurin skal burtur og tí eru tey ímóti eini fullveldisgongd, og tá hetta er burtur, hvat hava tey tá at velja ímillum. Hevur verandi løgtingssamtyktt um sjálvstýri ikki tikið avgerðina fyri tey? Eru tá slagorðini "Í Føroyum skulu føroyingar ráða" galdani ?

Millum annað skrivar eitt av valevnum floksins í eini grein, at tíbetur bleiv ætlaða fólkaatkvøðan avlýst, tí veljarakanningin anno feburar 2001 vísti, at uppskotið hjá samgonguni fór ikki at fáa neyðugan meiriluta. Er tað at lata føroyingar ráða? Tá ein ikki dámar hvat fólkið fer at siga, so letur ein tey ikki sleppa at siga nakað sum helst !

Vit liva í einum demokratiskum landi, har meirilutin ræður. Eisini í tinginum er tað meirilutin, sum ræður. Tú hevur møguleik an at atkvøða ja, nei ella blankt, men tað er meirilutin sum avgerð. Og eigur hetta at verða so, um vit ikki skulu vera undir einaveldi.

Eg eri persónliga fyri at Føroyar verða ein sjálstýrandi tjóð við øllum avgerðarrætti heima her í Føroyum, so tað er ikki tí at eg eri ímóti politikkinum hjá samgonguni um eina sjálvstýrandi Føroyar, men heldur mátanum tað verður gjørt uppá.

"Í Føroyum skulu føroyingar ráða", við tað at teir sleppa á eini fólkaatkvøðu, at avgerða hvat fólkavaldu politikkarnir skulu arbeiða ímóti, fullveldi ella øðrum sambandi við Danmark.

Tað er neyðugt, at komandi løgtingsmenn og kvinnur taka hetta mál í álvara, og royna samman at finna eina loysn, sum meirilutin av Føroya fólkið vil taka undir við.

Lat meg so siga, at rætta loysnin fyri Føroyar er ikki Fullveldi ella Heimastýri, men at Føroyar eru undirgivnar Gudi í øllum avgerðum. Fáa vit fullveldi, men undirgeva okkum ikki Guds vilja við landi okkara, koma vit ikki at hava framgongd. Tað sama um vit vera verandi í ríkisfelagsskapi við Danmark. Einar Føroyar, sum eru yvirgivnar fult og heilt til Gud, er einasta svarið fyri okkum, tí sum Jákupsbræv 4;8 sigur: Haldið tykkum nær til Gud, so skal Hann halda Seg nær til tykkara!

Gev Miðflokkinum tína atkvøðu 30. apríl.

# Hugsa frameftir !

**Erikka Eltør**
*Klaksvík*
*Valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*

Ert tú ungur og hugsar: "hví verða í felagsskapi við Danmark"? Her er eitt dømi um hví.

Tú hevur í Danmark somu rættindi sum danskara til lærustovnar, íbúð og studning. Tú hevur møguleikan at velja tær eitt reytt ES-pass, og við tí í hondini kanst tú við fullari ferð fara ígjøgnum alt ES.

So vel tær frælsi, X við B

# Tryggan ungdóm

**Edva Jacobsen**
*Fuglafjørður*
*Valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Vit í sambandsfokkinum vilja áhaldani arbeiða fyri, at tey ungu hava eina trygga framtíð við møguleikum á jøvnum føti við hini norðanlondini.

Hetta skal millum annað innibera:
Víðari lesna uttan fyri Føroyar.
Lestrarstuðul úr SU.

Hesin møguleiki er best tryggjaður í ríkisfelagsskapi við Danmark.

Vel tryggleikan, vel Sambandsflokkin.

# Nýggju læknahølini í Havn vóru beinleiðis ætlað nýggja læknanum

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur*



Viðmerking til greinina Lýsingin óheppið orðað, í Sosialinum 27 mars. 2002.

Tað er ósatt, tá Beate L. Samuelsen sigur, at tað umgirnið er sagt, at nýggjasti kommunulæknin í Havn skuldi hava nýggju læknahølini, tá ið søkt var eftir nýggjunda kommunulæknanum í Havn.

Eg var sjálv forkvinna í sosialu nevnd, tá ið vit samtyktu at byggja nýggju læknahølini. Hølini eru beinleiðis bygd til nýggjunda kommunulæknan og Kristiannu Nordendal.

Grundgevingin fyri at byggja tvær læknaeindir afturat var, at sosiala nevnd frammanundan hevði sagt upp hølini, sum Kristianna Nordendal, kommunulækni, var í, tí tey vóru ótíðarhóskandi. Samstundis heittu vit á Almanna- og Heilsumálastýrið um skjótast at fáa setta ein kommunulækna afturat í Tórshavnar kommunu, tí tørvurin var á einum lækna afturat. Svarið frá Almanna- og heilsumálastýrinum var, at tá ið kommunan kundi vísa á høli til nýggjunda læknan, kundi lýsast eftir einum afturat.

Tað var ongantíð uppá tal at nakar annar lækni skuldi flyta inn í nýggju hølini. Tað var einki galið við lýsingini eftir nýggjunda læknanum. Feilin eiga Beate L. Samuelsen, forkvinna í Sosialu nevnd Tórshavnar Býráðs og Heðin Mortensen, nevndarlimur. Tað vóru tey bæði, sum á fundi í Sosialu nevnd tann 18. september 2001 brádliga broyttu ætlanina, soleiðis at nú skuldi Jenis av Rana hava hølini heldur enn Kári Jacobsen. Sjálvt um Kári Jacobsen var settur og hevði verið við til at innrætta nýggju læknahølini.

Undirritaða og Hildur Eyðunsdóttir úr Tjóðveldisflokkinum tóku ikki undir við ætlanini, men kravdu málið fyri Býráðið.

Á Býráðsfundi tann 4. oktober 2001 broytti meirilutin (Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin) í Tórshavn Býráð avgerðina soleiðis, at nú skuldi Jenis av Rana flyta í nýggju hølini, meðan Kári Jacobsen skuldi yvirtaka gomlu hølini hjá Jensi av Rana.